# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 20.09.2024 |
| Mál nr.: | 24/20838-1 |
| Málsviðgjørt: | AW |
| Ummælistíð: | 20.09-07.10.2024 |
| Eftirkannað: | 19.09.2024 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bókasøvn (Bókasavnslógin)**
(Ásetingin um hvør fær lut í býtinum av bókasavnsgjaldinum verður víðkað)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 78 frá 1. juni 2023 um bókasøvn (Bókasavnslógin) verður § 22, stk. 1 orðað soleiðis:
"Landsbókasavnið skipar fyri árliga býtinum av bókasavnsgjaldinum, sum verður at býta til føroyskar rithøvundar, tónaskøld, týðarar, upplesarar, myndlistafólk og fotografar, hvørs prentaðu og talgildu bøkur og annað tilfar er til taks á bókasøvnum ella umvegis heimasíður teirra."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Orsøkin til broytingina í § 22, stk. 1 í bókasavnslógini er at heimila, at eisini tónaskøld, upplesarar og fotografar, hvørs prentaðu og talgildu bøkur og annað tilfar er til taks á bókasøvnum ella umvegis heimasíður teirra, kunnu fáa lut í bókasavnsgjaldinum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Bókasavnslógin ásetur í § 22, stk. 1, at bókasavnsgjaldið verður at býta millum rithøvundar, týðarar og myndlistafólk, hvørs prentaðu og talgildu bøkur og annað tilfar er til taks á bókasøvnum ella umvegis heimasíður teirra. Sambært galdandi løgtingslóg kunnu tónaskøld, upplesarar og fotografar sostatt ikki fáa lut í bókasavnsgjaldinum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at heimila, at øll tey, hvørs prentaðu og talgildu bøkur og annað tilfar er til taks á bókasøvnum ella umvegis heimasíður teirra, kunnu fáa lut í bókasavnsgjaldinum.

Tónaskøld og fotografar hava áður fingið bókasavnsgjald eftir reglugerðini fyri býtið av bókasavnsgjaldinum, sum var galdandi til 31. desember 2023. Í mun til býtið av bókasavnsgjaldinum fyri 2023, er tað sostatt bert upplesarar, ið koma aftur at við lógarbroytingini.

Við lógaruppskotinum verður ásetingin um, at bókasavnsgjaldið verður at býta til føroyskar rithøvundar, týðarar og myndlistafólk, víðkað, so hon fevnir um føroyskar rithøvundar, tónaskøld, týðarar, upplesarar, myndlistafólk og fotografar.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við broytingini fara tónaskøld, fotografar og tey, ið lesa upp ljóðbøkur, eisini at kunna fáa lut í bókasavnsgjaldinum.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið er sent til ummælis við freist 7. oktober 2024.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki við sær, at tørvur er á hægri játtan til bókasavnsgjaldið. Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur við sær, at Landsbókasavnið, sum umsitur bókasavnsgjaldið, skal rinda út bókasavnsgjald til teirra, ið eru fevnd av broytingaruppskotinum, tað vil siga tónaskøld, upplesarar av ljóðbókum og fotografar. Mett verður ikki, at hetta hevur við sær størri umsitingarliga byrðu fyri Landsbókasavnið.

Uppskotið hevur ikki aðrar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri tey, ið fáa lut í bókasavnsgjaldinum.

Mett verður, at at ein ljóðbók, sum er tøk á bókasøvnunum umvegis e-hillina (e-reolen), fer at geva upplesara kr. 252 í bókasavnsgjaldi fyri hvønn tittul. Vit vita ikki neyvt, hvussu nógvar ljóðbøkur eru tøkar á bókasøvnunum tann 1. november 2024, tá ið uppteljingin fer fram, men mett verður, at talið fer at liggja um 200. Eru 200 ljóðbøkur tøkar á netinum svarar tað til, at kr. 50.400 av bókasavnsgjaldinum verður býtt til upplesarar av ljóðbókum.

Tónaskøld og fotografar hava áður fingið lut í bókasavnsgjaldinum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingir millumtjóðasáttmálar, ið Føroyar hava bundið seg til, eru á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
1) Hoyvíkssáttmálin er ikki viðkomandi fyri bókasavnsøkið.

2) Lógaruppskotið hevur ikki ávirkan á viðurskifti á bókasavnsøkinum, har ásetingarnar í Evropeiska mannarættindasáttmálanum, EMRS, eru viðkomandi.

3) Lógaruppskotið hevur ikki ávirkan á viðurskifti á bókasavnsøkinum, har ásetingarnar í Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, eru viðkomandi.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar,

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur Landsbókasavninum skyldur um býtið av bókasavnsgjaldinum.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar Landsbókasavninum at býta bókasavnsgjaldið til føroyskar rithøvundar, tónaskøld, týðarar, upplesarar, myndlistafólk og fotografar, hvørs prentaðu og talgildu bøkur og annað tilfar er til taks á bókasøvnum ella umvegis heimasíður teirra.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Við uppskotinum verður skarin í bókasavnslógini § 22, stk. 1, ið kann fáa lut í bókasavnsgjaldinum, víðkaður til eisini at fevna um tónaskøld, upplesarar og fotografar.

Tónaskøld og fotografar hava áður fingið bókasavnsgjald eftir reglugerðini fyri býtið av bókasavnsgjaldinum, sum var galdandi til 31. desember 2023. Í mun til býtið av bókasavnsgjaldinum fyri 2023, eru tað sostatt bert upplesarar, ið koma aftur at við uppskotinum.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Almanna- og mentamálaráðið, 20. september 2024.

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur